# Uppgávur

**Navn:** ______________

## Undanvitan

• **Hygg at permuni:**




Hvussu sær persónurin fremst á myndini út? ________________________________

________________________________________

Hvar er hann? ________________________________



Aftast í bókini (s. 56) sært tú hesa myndina. Hvat sært tú aftan fyri persónin? ______________________

Persónurin er ein drongur. Drongurin er illur. Nakað syrgiligt hendi. Onkur má bøta.

Drongurin hugsar "Eyga fyri eyga, tonn fyri tonn"

Hvat heldur tú, tað merkir? ______________________

________________________________________



## Orðabók

**dreygur:** spøkilsi, ein, sum gongur aftur
**fjákalótir:** býtt ella skaput gerð
**landastrok:** ein, sum válar millum bygdir
**óviti:** barn
**verndareingil:** eingil, ið ansar eftir tær

## Les bókina

• **Skriva tey orð, sum IKKI hava nakað við gongulag at gera. Skriva tey á rætt stað í 1, 2 og 3:**

at gina　　at læa

at dylja　　at ganga　　at tøtla　　at tita

at sjora　　at vála　　at ragga　　at flekja

at stetla　　at spáka



1. at ____________ merkir at skera ella klúgva

2. at ____________ merkir at krógva

3. at ____________ merkir at flenna

• **Skriva:**

figurur úr postalíni: postalínsfigurur

borð at skriva við: ____________________

skógvar úr leðri: ____________________

kaldur sum ís: ____________________

spor eftir fótum: ____________________

ark úr pappíri: ____________________

**• Svara ja ella nei. Set X:**

| | ja | nei |
|---|---|---|
| Bókin hann finnur er um Emil | a | |
| Grímar brýtur ein eingil úr postalíni | d | |
| Grímar gongur aftur | r | |
| Bóndin bjóðar teimum mjólk | s | |
| Bóndin lovar teimum ikki inn | e | |
| Grannarnir klaga um larm og ófrið | y | |
| Mamman sær dreygan | f | |
| Drongurin er ein genta | g | |
| Grímar fær ein pakka | a | |
| Grímar er vanur at ganga berføttur | r | |

Hvat er tað, sum børn síggja men ikki vaksin? Set stavirnar saman í JA-svørunum: ___________________



**• Hvat merkir navnið Grímar (s. 51)?**

_____________________________________________________

**• Gentan sigur, at tey eru næstan sum landastrok. Hvør segði tað um Grímar og familju hansara (s. 21)?**

________________________________________

**• Grímar hevði ætlað at hevnt seg inn á eftirkomaran hjá bóndanum. Hvat ger hann í staðin fyri (s. 54)?**

________________________________________

**• "Eyga fyri eyga, tonn fyri tonn" hevur nakað við hevnd at gera.**

Heldur tú, at tað er í lagi at hevna seg? __________

Hvat merkir tað at fyrigeva? ____________________

________________________________________

Hvat heldur tú hendir, um tú ikki klárar at fyrigeva?

________________________________________

________________________________________

**• Orðagáta:**

 +  ÷ vur

Loysn: ____________________ (merkir kærleiki)